

*Dagligi leiðarin á Ísandssgarði býður bed&breakfast á gamla hotellini á Sandi, sum er snollað upp, nú ferðamannatíðin er byrjað aftur*

**Mynd:Jens Kr. Vang**

# Ból og biti á Sandi

*Gamla Hotel Ísandsgarður letur upp aftur undir navninum Ísandsgarður Bed&Breakfast*

DÁNJAL HØJGAARD

Bed&Breakfast.

Onglendingar hava gjørt hugtakið heimsgitið. Nú fáa føroyingar eisini eitt stað, har møguleiki verður hjá ferðandi, at gista og fáa sær eina morgunmatargita.

Gamla Hotel Ísandsgarður er umvælt og málað innan, og í dag letur tað dyrnar upp fyri føroyingum og útlendskum ferðafólki undir nýggjum navni.

Ísandsgarður hevur staðið tómur í eini átta ár. Navnarnir Torfin Hentze og Torfin Hentze Eriksen, sum báðir búgva í Danmark, hava keypt gamla hotellið, sum teir hava valt at gera til gistingarhús við bóli og bita.

Norska Vivian Pettersen er sett sum dagligur leiðari fyri nýggja gistingarstaðið heima á Sandi.

# Kærkomin summargestur

*Eins og hjá okkum eru ferðamannaskipini ein fráboðan um summarið í Hetlandi. Í tíðindaskrivi frá hetlendska ferðaráðnum verður sagt, at hetlendska summarið kemur við Norrønu*

Summarið byrjar í Hetlandi, tá Norrøna er komin, sigur Maurice Mullay, stjóri í hetlendska ferðaráðnum, Shetland Islands Tourism.

Hetlendska ferðaráðið sigur í tíðindaskrivi, at tey heilsa Norrønu sum einum vælkomnum bindiliði millum Hetland, Føroyar og Noreg.

Norrøna var fyrstu ferð í summar í Hetlandi mánadagin á veg til Bergen. Summarferðaætlanin er í ár frá 15. mai til 9. september.

Hetlendska ferðaráðið sigur, at umframt at vera portur úr Norðanlondum til Skotlands, hevur Hetland eina rúgvu av tilboðum til summargestirnar.

Ein serligur summarpakki er í ár gjørdur í samband við túsundáraskiftið. Í pakkanum er millum annað tey væl umtóktu hetlendsku kvøldini, har møguleiki er at royna hetlendskan mat og tónleik. Eisini er ein rúgva av øðrum tiltøkum sum til dømis festivalar ymsa staðni í landinum, »motor show«, »Shetland Pony show« og búnaðarsýning.

»Vit vóna, at gestir okkara í summar fara at dáma líka væl, sum gestirnir í fjør heilt greitt gjørdu,« sigur Maurice Mullay í tíðindaskrivinum frá Shetland Islands Tourism og leggur aftrat:

»Tað hevur ongantíð verið ein betri løta at vitja Hetland.«

ej

*Bygdastevna á Skála:*

# Trølla-Pætur fer á Skálastevnu

Nú tað stundar móti sumri, byrja stevnurnar aftur. Seinastu árini hava skálamenn verið teir fyrstu í røðini og tað verða teir aftur í ár. Nógv ítróttartiltøk verða á skránni, sum eisini rúmar vitjan av Trølla-Pæturi og Sámali Ravnsfjall. Og leygarkvøldið endar við rimmardansi í høllini og í bygdasalinum, har X-Rays og All that rain spæla

Seinastu nógvu árini hava skálamenn átt heiðurin av, at skjóta stevnuárið í gongd. Bygdastevnan á Skála hevur verið tann fyrsta í røðini í fleiri ár, og árið í ár er einki undantak í so máta. Við bygdastevnunum byrjar eisini kappróðurin, og nú fáa manningarnar møguleika at síggja, hvussu langt tær eru ávegis í venjingunum, sammett við hinar bátarnar.

## Trølla-Pætur vitjar

Ì ár hava skálamenn verið so hepnir, at fáa fatur á Trølla-Pæturi, sum annars er nokkso nýggjur á undirhaldspallinum. Hann var við á fløguni hjá Kularótum í fjør, men framførdi fyrstu ferð á palli á Kambsdali fyri einum mánaði síðani ella so. Tá segði hann børnunum, at hann var fluttur í Eysturpynna at búgva, men um tað er tí tað hevur eydnast at fáa hann út á Skála at framføra skal vera ósagt.

Trølla-Pætur verður at síggja í høllini í tveimum umførum leygardagin. Fyrru ferðina klokkan 16.30.

Klokkan níggju leygarkvøldið fer Sámal Ravnsfjall á pallin at undirhalda. Sámal er einastandandi góður tónleikari og yrkjari, sum við sínum framúrskarandi beinraknu yrkingum, fær áhoyrararnar at liva við.

## Nógvur ítróttur

Sum vera mann er nógvu ítróttur á skránni til eina bygdastevnu. Á Skála verður fótbóltur í øgiligt mát og á øllum stigum. Dýra Biðidag spæla tey vaksnu sínar dystir, og tíðliga leygarmorgunin leggja teir ungu til brots. Klokkan níggju byrja teir, so hildið verður fram til umleið klokkan fýra seinnapartin.

Seinni leygardagin verður skemtidystur á skránni. Arbeiðsfólki á Skála Skipasmiðju hevur bjóðað starvsfeløgunum í Havn av, og steyp eru sett upp á spæl til dystin eisini.

Sunnudagin verður so kappróðurin. Nógvir bátar plaga at vera við og tað vera tað væntandi eisini hesaferð. Aftaná róðurin verða steyp og heiðursmerki latin vinnandi bátunum.

Undan og aftaná kappróðrinum verður eisini súkklukappingar. Bæði ung og eldri fara at royna seg á teimum tveyhjólaðu, og súkklukappingarnar eru vornar afturvendandi táttur á bygdastevnuni á Skála.

## Stórdansur í høllini

Sum vera mann verður eisini skipað fyri dansi. Seinastu árini hevur verið vanligt, at dansurin hevur verið í bygdarhúsinum á Strondum, men so verður ikki í ár.

Ítróttarfelagið á Skála roynir seg í ár við stórdansi, og tað merkir, at tveir bólkar skulu spæla til dans. Annar fyri teimum yngru, sum spælir í høllini, og hin fyri teimum, sum ikki eru yngri meir og hann verður í bygdarsalinum.

Hetta er fyrstu ferð, at dansurin verður skipaður á henda hátt, og nevndin í ítróttarfelagnum á Skála vónar, at undirtøkan verður góð.

Bólkarnir, sum spæla, verða All that rain og X-Rays.

Tey, sum ikki hava hug at fara í dans, hava kortini okkurt at fara til. Allar dagarnar vera møtir og sunnudagin verður eisini kirkjugongd, har Jógvan Fríðriksson, prestur, fer at prædika.

Annars verður tað Súni Kristiansen, skúlastjóri, sum setir stevnuna klokkan 16 leygardagin.



*Sláturneytini hjá Arne Jensen, bónda í Skúvoy verða hivaði umborð á Rituna.*

**Mynd: Jens Kr. Vang**

# Sláturneytini fóru úr oynni

Týsdagin var Ritan við farmi í Skúoynni. Við sær aftur til Havnar hevði hon trý sláturneyt, sum skuldu drepast á sláturvirkinum hjá MBM í Hósvík.

Arne Jensen, bóndi á Útistovugarðinum í Skúgvi hevur vanliga millum 30 og 40 sláturneyt á garðinum og eini10-15 verða dripin um árið. Hendan dagin vóru tað tveir tarvar og ein kúgv, sum fóru úr oynni.

Meginparturin av tí, sum dripið verður á Útistovugarðinum slakta teir sjálvir, og sostatt er tað tann minni parturin sum fer livandi av oynni.

Tað loysir seg betri at slakta sjálvur, sigur Arne Jensen. Fyri neytini, ið verða slaktaði í Hósvík fær hann 22 kr. kilo, meðan hann kanska fær 25 kr. kilo fyri tey neyt, hann sjálvur drepir, sigur hann.




Í býin - altíð eitt stað at fara

Streymoy

Kaggin
Mr. Jolly Fluffy Toys
spælir til dans Leygarkvøldið
Fríggjakvøldið verður stongt
Kaggin Kaggin Kaggin
www.kaggin.fo
Sosialurin - 311820

SKAR‹HAMAR´S BUSSKOYRING
v/ He›in Skar›hamar, Sleipnisgøta 13. B, FO–100 Tórshavn
TAXA
MINI BUSS TIL 10 FER‹ANDI
288888
FR • VISA • EUROCARD • MASTERCARD • JCBCARD

AUTO
- Dag sum nátt -
- skjótt og gott -
Skalt tú bil hýra
- so er tað 311234
AUTO
BENZIN
DIESEL
KIOSK
- ALT DØGNIÐ -
AUTO 311234

CAFÉ NATÚR
* * *
Staðið har vit hittast
***

Long drinks Café
CLEOPATRA
Við gongugøtuna
Opið er:
Mán.– Hós. kl. 19.00 – 23.30
Fríggjadag kl. 17.00 – 03.30
Leygardag kl. 19.00 – 03.30
Sunnudag kl. 17.00 – 23.30

Norðoyggjar

Klaksvíkar Klubbi
Leygarkvøldið 20. mai
verður dansur "KRISS" vendir plátum
Fríggjadagin 19. mai
verður opið sum sunnudag
Klubbin hevur:
POOLBORÐ
BILLARDBORÐ
ENSKAN FÓTBÓLT Á SKY

Í BÝIN
Fylgið við hvat hendir kring oyggjarnar í vikuskiftinum
sosialurin

NÁTT-BUSSURIN
hjá Øssuri Christiansen
Leygarkvøldið:
• Úr Vestmanna kl. 24
• Úr Tórshavn kl. 01
• Úr Vestmanna kl. 04
• Úr Tórshavn kl. 05
(Koyrt verður um Kvívík og Kollafjørð, tá fráboðan fyriliggur)
Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu
Tlf. 424254
Bussarnir:
Tlf. 287752 • 286254

fk Matseðilin
Hósdagin 18. mai:
Paprikagrýta
Leygardagin 20. mai:
Kulottesteik
Mánadagin 22. mai:
Kjøtfrikadellir
Týsdagin 23. mai:
Fiskur í fati
Mikudagin 24. mai:
Minuttbúffar
Kostnaður 30,- kr.
***
Seinnaparts-TILBOÐ
frá kl. 14.00:
Juniorburgari 14,95
Maxiburgari *ella*
Búffsandwich 19,95
Matstovan í Hoyvík

Vilja tygum vi› í
Í b‡in - hvønn hósdag
Ynskja tygum at l‡sa í teiginum *í b‡in*, so fylli› út henda lepan og sendi› hann til **Sosialin, box 76, 110 Tórshavn** – ella fax 314720
Tekstur

DAGFØR TEG
sosialurin
HALT
SOSIALIN
Tekna teg sum haldara, so fært tú sosialin 5 ferðir um vikuna til dyrnar

Tíðindablaðið
sosialurin
Box 76
110 Tórshavn
ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið
64

Undirritaði teknar seg sum haldara av Tíðindablaðnum Sosialinum, og fái blaðið *5 ferðir um vikuna.*

Navn:
Búst.:
Postnr., bygd, býur:
Tlf.:
Undirskrift:

☐ Haldarar F¿royum: 320,-/ rsfj.
☐ Haldarar Europa: 490,-/ rsfj.
☐ Onnur lond: Ymiskir pr sir
☐ Internet: 240,-/ rsfj.